# Lina Høgnesen

**19. septembur 1927 – 24. apríl 2009**



Góða mamma!

Varð tað, sum náttúran spældi kortini fyri 52-53 árum síðani, so var eg ikki her í dag. So hevði tú havt livað meg av við 52 árum. Men tit vildu tað øðrvísi, og tað er ein longri søga, sum eg altíð havi havt við mær í virðing. Men tað var ein kolikkur fyri fimm árum síðani sum flutti hesa søguna úr høvdinum og teimum sentimentalu kenslunum og í mønu og merg. Tað var ikki ein drúgvur kolikkur, men bara ein uppá 2-3 vikur. Ikki ein ringur kolikkur, men bara ein mildur kolikkur. Men knappliga upplivdi eg tað, sum eg ongan kjans havi at minnast. Og eg græt. Sum eg bar Róa upplivdi eg sterkari enn nøkur videoupptøka hevði kunnað fortalt mær, hvussu tú og tit hava borið meg, á degi, á kvøldi og á nátt ... dagar út í eitt og í áravís ...

Andlátið av tær var lýst sum hjá teimum flestu: Lina Høgnesen – uttan tittul – andaðist á Landssjúkrahúsinum. Men eg kann saktans ímynda mær eina lýsing, har tú hevði ein fínan tittul og andaðist onkunstaðni úti í heimi. Tú lærdi til sjúkrasystir. Men ein elevur, sum bar barn undir belti, kundi ikki verða sjúkrasystir. Ikki tí at ráðini ikki vóru til tess. Ikki tí at farloyvi ikki var uppfunnið. Nei, elevurin var fallin og hevði ikki tignina at bera kappan.

Tú hevði verðið ein fín sjúkrasystir. Upplagdur kandidatur sum besta sjúkrasystir, sum Føroyar ongantíð hava havt. Tú hevði eitt heilt framúr talent fyri at liva teg inn í støður, at fornemma menniskjur og at skipa fyri. Eitt heilt sjáldsamt talent at skipa fyri! Hvør veit: Kanska hevði tú verðið sjúkrarøktarstjóri og verið við til at sett skikk uppá tað sjúkrahúsverkið, sum tú tænti í eini 30-35 ár.

Tú kundi eisini havt verðið akademikari. Ikki í matematikk. Ikki í máli. Men okkurt við organisatión – kanska stjórnmálafrøðingur, sosiologur ella antropologur, ið stóð fyri menningararbeiði burturi í londum ... tikin úr leikum at halda skil á tilfari og tíðarætlan og at fáa menniskju at samvirka. Ella tú kundi verið gastronomiskur ambassadørur fyri Føroyar og føroyska matmentan á Norðuratlantsbryggjuni ella onkra aðrastaðni á globusinum ...

Alt hettar eru bert orð, orð og orð, mamma. Míni orð um tað, sum kundi havt verið, men sum ikki bleiv. Og hettar við teimum mistu møguleikunum kundi verið sagt um so mong í tínum ættarliði, kanska serliga kvinnurnar. Men eg veit um nógv í tínum ættarliði, sum eru beisk um og ógvuliga ávirkaði av, at teimum ikki untist umstøður at royna síni evni og sínar førleikar til fulnar. Óivað hevur tú havt tínar innhugsnu løtur um hettar, men tað merkti teg ikki á neiligan hátt. Tú tókst veruleikan, sum hann var, og vart heil har tú vart.

[Tú arbeiddi úti og heima, mamma. Og hvørjum eg so møti, so fært tú sama góða skoðsmál. Tað leið so væl eftir, sama um tað snúði seg um matgerð, klæðnavask ella okkurt heilt annað. Tú hevði tína greiðu uppfatan av, hvussu tingini skuldu gerast. Minnist tú hitt kvøldið, tá ið Dagur & Vika bar tey tíðindi, at tað var nógv dýrast pr kilo at vaska klæðir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi? Og tí mæltu landsins heilsufakligu heilar til at leggja vaskaríið niður ... Tá hevði tú lagt alla orku í at trimma arbeiðsplássið til tann beiska kreppuveruleikan, - ikki uttan svørðslag, men við eini fyriskipan, ið skapti virðing. Tú segði bara so sáttliga: “Hattar kann ikki passa. Far og kanna hattar fyri meg!”. Og í samstarvi við leiðslu og starvsfólk fekst tú prógvað, at púrt einki var í pástandinum. So væl var trimmað, at fíggjarnevnd løgtingsins í allari stillheit legði frágreiðingina burtur og tók ongantíð málið upp á tungu aftur.]

Tú livdi títt stilla lív, mamma. Men tað er synd at siga, at tað var stilt rundan um teg. Og hvussu kundi tað tað: “Vit eru seks menn og so mamma!” sum ein okkara tók til, tá ið hann var spurdur, hvussu nógvir beiggjar vit vóru. Úti í túninum spældu heil fótbóltslandslið – Ongland og Brasilia og Týskland og hvat veit eg, og spældu tey ikki í túninum, so spældu tey í gongini. Og úti í kamarinum sjangraði ikki bara ein bandupptakari, sum hjá flestum ungdómum. Nei, uppi á loftinum trenaði eitt fullmannað orkestur við fullari útgerð at spæla til dans. Og úti í túninum komu og fóru knallertir og bilar, og vissi tey ikki komu ella fóru, ja so stóðu tey har og blivu spydaði upp bara soleiðis so hissini ella blivu repareraði ella vaskaði við víðopnum hurðum og ‘fuld musik’ ...

Tú hevði ein einastandandi humoristiskan sans. At tú ert farin er bæði veruligt og óveruligt í senn. Og meðan eg stóð og hugdi niðuryvir teg fríggjamorgunin, har tú lá so náttúrlig og vøkur og tignarlig, og kenslurnar slitu allar teymar, tá trokaði tín sansur fyri lívsins gaman og álvara seg fram í mær, og eg sá knappliga fyri mær, at tú lat eyguni upp og segði við meg: “Statt ikki her og grát sum eitt býtt. Skrubba av til arbeiðis við tær!”. Hvørt skal siga: Hettar er sum tað eigur at vera og er einki at gráta um.

Einaferð, tá ið ein abbadóttir spurdi teg um okkurt, sum eg havi gloymt – eg haldi tað var eitt ungdómsbílæt av tær – so svaraði tú, at “hattar var tá ið omma var ung og pen”. “Og rík!” smekkaði ommudótturin til. Hon hevur tað ikki frá fremmandum. Og rík vart tú, og eins og sóljugentan og Karin, so gavst tú, - gavst av tínari tíð, tínum tolni og tínum talentum. Tú hevur ríkað okkum so tað forslær, bæði í fyrsta og annað og triðja lið ...

Hvønn dag, mamma, rammaði tú lívið inn hjá mær, - morgun og kvøld. Hvønn morgun ferðaðist hond tín fyri eygum mínum á ytstu gátt, meðan tú mutlaði nøkur orð, tey somu hvørja ferð. Eg upplivdi tað altíð eitt sindur sum eina flugu sum surraði fyri andlitinum, men samstundis sum nakað blítt og unniligt og gott. Ongantíð fekk eg við, hvørji orðini vóru, og ongantíð síðani havi eg spurt teg heldur. Men enn føli eg tær kærleikans hendur og enn síggi eg fyri mær tey kærleikans eygu, sum sleptu mær út í dagin. Og tá ið dagurin var at enda komin, so sangst tú “Góða mamma, eg vil sova ...”. Altíð. Helst hevur tú mangan verið nógv móðari enn eg. Eg má siga akkurát sum er, mamma, men skomm at siga frá, so veit eg ikki, um tú sang væl. Men einki hoyrdi eg vakrari, inniligari og eymligari enn hendan sangin, sum bar meg inn í svøvnin hvørt kvøld.

Men nú skal eg gevast at tosa, mamma! Tú skalt hiðani, og sjálvt um síðsta tárið ikki er felt, so er hettar akkurát sum tað eigur at vera. Og eg veit akkurát hvussu tú hevur tað: Tú vilt vera betíðs! So nú skalt tú sleppa hiðani ... Men eg haldi, at eg tosi fyri okkum allar, tá ið eg sigi, at tú sleppur ikki hiðani uttan at vit hava sungið “Góða mamma, eg vil sova” fyri tær”. Tað skuldi bara mangla!

Hvíl í friði, mamma, og takk fyri alt ...

**Ólavur**

# Regin Guttesen við nýggjari fløgu



*Regin Guttesen er komin út við nýggjari fløgu*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Mikudagin 20. mai varð nýggja fløgan ”FJAKKARI” hjá Regini Guttesen presenterað á móttøku á Hotel Djurhuus í Havn.

Tólv spildurnýggj løg eru á fløguni. Talan er um sangir við føroyskum tekstum, sum Regin, fyri stóran part, sjálvur hevur skrivað, meðan hann og familjan hava verið búsitandi í Italia - har tey búgva enn.

Fløgan er innspæld í Kris-Stuff Studio í Havn og Fix-n-Mix Studio í Danmark. Óli Poulsen hevur framleitt, og framleiðslustjóri var Jákup Zachariassen.

*mg*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við blómum, kransum og á annan hátt sýndu samkenslu, tá ið

**Janus Kamban**
myndahøggari

andaðist og varð borin til gravar.
Vit takka Bjarna Bæk, dómprósti, fyri innihaldsrík og uggandi orð. Somuleiðis takka vit kirkjutænarum, gravarhjálp, sangarum, berarum og tykkum, sum gjørdu ervið vakurt og fjálgt.
Vit veita starvsfólkunum á Umlættingarheiminum, í Eldrasambýlinum Oman Hoydalar og á Landssjúkrahúsinum eina hjartans tøkk.
Eina serstaka tøkk veita vit Ólavi Hátún og hansara kóri fyri, at tey við síni framførslu góvu jarðarferðini sína serligu tign.

**Ættfólkið**

**Dagurin**
**22. mai. Castus**, deyður umleið ár 250. Saman við øðrum brendur á báli í Kartago.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*